# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo



Faroe Dive, Klaksvík:

## Antinis Poulsen prógv sum bjargingarkavari

**Tíðindaskriv**

Um vikuskiftið tók Antinis Poulsen, kavari, úr Klaksvík prógv sum bjargingarkavari hjá kavaraskúlanum Faroe Dive í Klaksvík.

Antinis hevur í eina tíð tikið bæði skrivligar og handaligar royndir í evninum bjarging í og á sjónum.

*Eftir endaligu royndina á sjónum, f.v.: Antinis Poulsen, bjargingarkavari, og Janus Joensen, kavarainstruktørur*

# Gott at vera hjá PM

**Vit hava sett John Høj Joensen úr 9. a í Stranda skúla nakrar spurningar um tað at vera í starvsvenjing**

STARVSVENJING
*Dia Johansen*

John Høj Joensen er 15 ára gamal og gongur vanliga í 9. flokki í Stranda Skúla.

Hann er nú í starvsvenjing í heilsøluni hjá Poul Michelsen í Havn – PM-heilsøluni, og honum dámar sera væl at vera har.

Tað vanliga arbeiði hjá honum er at seta vøru upp á pláss við trukkinum og gera ordrar klárar, men í gjár setti hann bara vøru upp á pláss.

– Hetta er sera áhugavert, heldur hann.

Eisini plagar hann at koyra vørur út til bygdirnar og tað heldur hann eisini vera stuttligt. Tann eina dagin var hann við sølumanninum ein túr og vitjaði fleiri handlar.

– Eg vildi í starvsvenjing hjá Poul Hansen, men har var upptikið, og tí fór eg her. Her man vera minst líka gott, sigur hann.

Sovorðið arbeiði dámar honum væl, men hann hevði kortini ikki tímað at arbeitt har altíð.



*Mánamorgunin gjørdi John Høj Joensen ordrar klárar til bygdirnar. Her er hann í ferð við at gera ein platt kláran*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tórshavnar alfrøði:

## Konfirmantar í 1909



Her er ein mynd av konfirmantum í Havnar kirkju 18. apríl 1909. Vit hava øll nøvnini men kenna ikki allar persónarnar á myndini. Vónandi kann onkur av lesarum okkara hjálpa til við at fáa nøvnini upp á pláss.

*Aftara rað f.v.:* ókendur, ókendur, Olava Gurine Margrethe Nielsine Krogh, Mourits Bernhard Mohr, ókendur, ókendur, Hans Sigurd Lindenskov, ókendur, ókend.

*Fremra rað f.v.:* ókend, ókend, Susanne Cathrine Niclasen (Sanna í Bókhandlinum), og Sigrid Simonsen.

Tey nøvnini sum vit mangla at fá upp á pláss eru: Ellen Malene Nicolajsen, Susanne Julie Theodosia Justinussen, Alexandra Christine Hansen, Johannes Nicolajsen, Jacob Pauli Jacobsen, Einar Danielsen, Johan Magnus Arge (Argir), og Andreas Martin Rubeksen.

Tey, sum kenna fólkini á myndini, verða biðin um at seta seg í samband við Birgar Johannessen á tel. 214647 ella 314647.

BYGGIBÚÐ
damor


Loftstrappa
Hvítan botn
70 x 120, Stigin er 280 cm
998,-


Gipspláta
120 x 240 cm
13 mm tjúkk
einans 98,-


Damixa Amatur
Til køk ella bað
Stílfullur og elegantur
1.398,-


Brúsa
80x80, v/ bakka
v/ Brúsustong, slangu
og brúsuhøvdi
2.698,-

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor